politiskum stríðsmanni« skrivar Dagblaðið nú um dagarnar — um somu tíð, sum tað verður almannakunngjørt, at blaðstjórin á Sosialinum og tingmaðurin Jóannes Dalsgaard skulu stevnast.

Uttan mun til hvat Føroya rættur enn kemur til í einum møguligum dómi, skerst ikki burtur, at Óli Breckmann við sínum tilknýti til hesar umrøddu felagsskapir er við til at fremja undirgravandi virksemi við teimum útspillingarherferðum sum hava og verða riknar móti demokratiskt valdum politikarum.

Hansara leiklutur sum fólkatingsmaður í hesum sambandi er heilt óverdugur. Men nýtist okkum í heila taki at fara til Danmarkar at finna prógv fyri at Óli Breckmann roynir at undirgrava øll, sum hava aðra politiska meining og hoyra til á vinstraveinginum. Vit kunnu bert leita hetta fram í Dagblaðnum hesi 11 árini hann hevur sitið sum blaðstjóri.

Skrivingin móti Williami Heinesen og øðrum kendum og minni kendum fólkum í Føroyum hevur verið merkt av einvísari útspilling, fyri ikki at siga undirgraving.

Tann, sum hevur fylgt við í hesum málinum um SVDF og leiklutin hjá Óla Breckmann í hesum felagsskapi gjøgnum blaðið Facet og sum hevur blaðað í Facetbløðunum, fer at ívast stórliga í, um ikki júst útspillandi skrivingin í Facet hevur verið við til at inspirerað til ta útspillandi skriving, sum hevur verið at sæð í Dagblaðnum nú í nógv ár.

Facet og Dagblaðið eru í mangar mátar meinlík.

jan

12 3. sektion • POLITIKEN • Søndag 21. september 1986

Højrefløjen marcherer

Kortlægning af gruppen der har forbindelse til MFere og dele af pressen

Af Birger Thøgersen





Jyllands-Posten er velnok den danske avis, der er mest gavmild med spalteplads til de højreorienterede kampagner mod Gert Petersen og Nicaragua.

Ritt Bjerregaard er af yndlingsofrene i de højreorienterede blade.

176 danskere

Hemmelige numre

Aktion Gert




Facet-bladet er talerør for en række højreorienterede grupper i Danmark. Bladet kører i øjeblikket en kampagne imod Verdens Freds-kongressen, der skal holdes i København til oktober.

CD og KrF.

De kristne

Sydafrikas venner

Radio til Sovjet og Albanien



Bent Belling (v.borgm.)
Ledøje-Smørum

Ledøje Smørum, den 1o.8. 1986

Socialistisk Folkeparti
Folketingsgruppen
v/Ebba Strange

Vedr. Gert Petersen's troværdighed.
Efter flere store ubehageligheder i den sidste måned i mit politiske arbejde tillader jeg mig at forespørge om det er opportunt, at foreslå nyt valg af formand for SF ?? Gert Petersen kunne jo trække sig frivilligt.

Med kammeratlig hilsen

Med dette falske brev har folkene bag kampagnen mod Gert Petersen forsøgt at skabe splid i partiets egne rækker.

Falsk brev led i kampagne

Brugte brevpapir fra viceborgmester for at ramme SFs ledelse

Jeg er rystet

Falsk underskrift

Troede på brevet

Smadrede biler

Antimilitaristisk konference 27.-28. september
Rød realisme contra kustode-pacifisme

Framhald av síðu 6

verið vitandi um figgjarligu støðu landsins. Vit hava ansað eftir figgjarstøðuni hjá kommununi, hava konsoliderað og niðurgoldið lán, so vit eru førir fyri á tryggum figgjarligum støði at taka tey tøk, ið vit vistu máttu takast. Um landsins myndugleikar ikki forða okkum at reka henda sunna búskaparliga politikk í kommununi, verður tað hann ið fer at bjarga okkara kommunu, og hvørki Tórfinn Smith ella landsstýrið, ið vilja hava alt virksemi í Havn út á bygd.

Bygdamenning

Tann parturin av kæruni hjá Tórfinni Smith um bygdamenningina var ikki so lítið avdúkandi, og satt at siga er ikki neyðugt at leggja nakað afturat, heldur ikki tá hann illgitir um E. Pihl & Søn og Landsbyggifelagið og vil hava nevnd, ið hevur lokið arbeiði sítt, at arbeiða víðari.

Eftir stendur tó sum fyrr nevnt tað ótrúliga, at býráðslimur í Havn skal taka fult undir við politikki landsstýrisins um bygdamenning, soleiðis at **verandi** almennir stovnar skulu flytast úr Havn, og soleiðis at umstøður bert skulu veitast vinnuvirkjum at trívast í útjaðaranum av landinum, tí soleiðis má hetta skiljast.

Eingin við síni fullu fimm kann fáa seg til at koma við slíkum — tí, hvørjar verða avleiðingarnar her í Havn — tá verandi almennir stovnar ikki vera her longur, og tá vinnuvirkir ikki longur fáa møguleikar at trívast her? Eitt er so ikki at ívast í, at eftir tann dag verður ikki neyðugt at stúra um barnaansing, tí tá verður vælsaktans einki annað at takast við her — í høvuðsstaði føroyinga.

Poul Michelsen
býráðsformaður

heldur tú ikki sosialin